UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## OPEC økir ikki

Oljumálaráðharrarnir í OPEC-londunum samdust týsdagin um at varðveita verandi oljuframleiðslu. Orsøkin er, at eftirspurningurin hevur verið minkandi seinastu tíðina.

Avgerðin ber í sær, at OPEC-londini fara at halda núverandi framleiðsluna teir næstu tríggjar mánaðarnar. Avgerðin varð tikin eftir einum tilmæli frá Iran, Kuwait og Nigeria.

OPEC-londini skerdu sína framleiðslu 20 prosent síðsta heyst fyri at steðga prísfallinum, sum kom eftir atsóknirnar tann 11. september. Samstundis eydnaðist felagsskapinum at fáa onnur oljuframleiðandi lond so sum Noreg, Russland og Meksiko at gera tað sama. Tað hevði við sær, at prísirnir hækkaðu aftur, men eftirspurningurin hevur verið minkandi, og goymslurnar í nógvum keyparalondum eru fullar.

Noreg og Russland hava síðani gjørt av at økja framleiðsluna aftur.

### Størri bøtur

Danskar fyritøkur, sum bróta kappingarreglurnar, kunnu frá 1. august vænta at fáa harðari revsing enn higartil. Tá kemur ein nýggj kappingarlóg í gildi, og hon gevur Kappingarráðnum heimild til at áleggja fyritøkum munandi størri bøtur enn higartil.

Bøturnar eru í trimum stigum. Fyri minni álvarssom brot kunnu fyritøkur fáa upp til 400.000 krónur í bót. Er brotið álvarssamt, kann bótin vera millum 400.000 og 15 milliónir krónur, og er brotið serliga álvarssamt, er bótin í oman fyri 15 milliónir krónur.

### Byggja aftur

Tað eydnaðist mánadagin at loysa lønartrætuna í týsku byggivinnuni. Eftir samráðingar í 22 tímar samdust arbeiðsgevararnir og fakfelagið um 3,2 prosent í lønarhækking 1. sept. 1. apríl næsta ár hækkar lønin 2,4 prosent afturat. Herumframt fáa fólk í byggivinnuni 560 krónur eyka um mánaðin í juni, juli og august.

# Ísrael vísir tíðindafólkum burtur



*Ísraelskir hermenn á varðhaldi uttan fyri Betlehem. Teir hava m. a. fingið boð um at forða tíðindafólkum at sleppa inn í palestinsku býirnar*

*Mynd: Reuters*

**Ísraelski herurin hevur sett tíðindafólkum bann fyri at fara inn í teir hersettu býirnar á Vestara Áarbakka**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Ísraelski herurin noktar nú tíðindafólkum atgongd til teir palestinsku býirnar á Vestara Áarbakka, sum herurin hevur hersett teir seinastu dagarnar. Heldur ikki tey palestinsku tíðindafólkini sleppa at arbeiða, tí tey eru umfatað av útigongubanninum, sum er lýst fyri býunum.

Ísraelska herleiðslan sigur, at hon hevur sýtt tíðindafólkum at sleppa inn í býirnar, tí viðurskiftini eru ikki nóg trygg, men tey flestu kenna seg sannførd um, at endamálið við banninum er at forða møguligum atfinningarsomum tíðindum.

Bannið umfatar eisini ísraelsk tíðindafólk. Aviv Lavie, sum er viðmerkjari á blaðnum Ha'aretz, ivast ikki í, at endamálið við banninum er at køva allar atfinningarsamar røddir.

- Eg haldi, at Sharon vil sleppa undan atfinningarsomum spurningum frá ísraelska fólkinum og altjóða samfelagnum í sambandi við hersetingina á Vestara Áarbakka, sigur Aviv Lavie.

Ein tíðindavinna hjá bretska sjónvarpinum ITN er talsfólk hjá teimum útlendsku tíðindafólkunum í Ísrael. Hon sigur, at nú herurin noktar tíðindafólkunum at arbeiða, noyðast ísraelsku myndugleikarnir eisini at góðtaka tey hissini tíðindini, sum koma frá innrásini á Vestara Áarbakka.

Tað eru tó ikki øll tíðindafólk, sum vilja gera eftir boðunum frá ísraelska herinum. Tá Yasser Arafat helt tíðindafund í Ramallah týsdagin, vóru næstan 50 tíðindafólk til staðar.

# Gera kjarnorkugoymslu á Novaja Zemlja

**Russar ætla at gera eina goymslu til kjarnorkuburturkast frá gomlum kavbátum á Novaja Zemlja**

RUSSLAND
*Árni Joensen*

Umhvørvismyndugleikarnir í Moskva hava givið russiska herflotanum loyvi til at gera eina goymslu til kjarnorkuburturkast á Novaja Zemlja. Ætlanin er, at goymslan skal taka 55.000 tons av burturkasti, og tað fer at kosta umleið 550 milliónir krónur at gera goymsluna. Arbeiðið er mett at taka millum fimm og sjey ár.

Russiska flotaleiðslan hevur avgjørt, at190 kjarnorkuriknir kavbátar skulu takast úr flotanum. Higartil er kjarnorkuburturkastið fingið úr 97 kavbátum, men nógvir kavbátar liggja við bryggju við burturkastinum umborð. Sagt verður, at teir elstu bátarnir hava ligið soleiðis í 15 ár, tí eingir pengar hava verið til ruddingararbeiðið.

Russisku myndugleikarnir hava fyrr mett, at tað fer at kosta millum 20 og 25 milliardir krónur at taka teir 190 kavbátarnar úr drift. ES og Noreg hava boðið sær til at fíggja ein part av útreiðslunum, men higartil hava russar ikki viljað tikið av tilboðnum.

Fleiri vesturlendskar fyritøkur hava eisini boðið sær til at beina fyri kjarnorkuburturkastinum, men heldur ikki hesum hava russisku myndugleikarnir víst stórvegis áhuga.

Sovjetsamveldið plagdi at gera kjarnorkuroyndarspreingingar á Novaja Zemlja. Tann seinasta var í november í 1990.

Úr Norðurlondum:

## Ógiftir prestar vrakaðir

Nógv bendir á, at kirkjuráðini í Danmark leggja ikki so stóran dent á útbúgving og kristnar áskoðanir, tá tey seta prestar í starv, men attað hevur størri týdning, at prestarnir eru giftir.

Holger Jepsen, biskupur á Lollandi og Falster, sigur við Jyllandsposten, at nógv kirkjuráð tykjast hava ta uppfatan, at er presturin giftur, fáa tey í veruleikanum hálvt annað starv, tá tey seta prestin. Tað hálva eykastarvið, sum sjálvandi er ókeypis, liggur m. a. í tí, at prestafrúan skal baka køkur og tílíkt til fundirnar hjá kirkjuráðnum, sigur biskupur. Karsten Nissen, sum er biskupur í Viborg, sigur við blaðið, at tað er serliga trupult hjá ógiftum prestum at fáa starv úti á landinum. Tað sama siga biskuparnir í Ribe, Haderslev og Århus.

Formaðurin í danska prestafelagnum, Peter Krogsøe, sigur tað vera ósakligt, at summir prestar verða settir til viks, tí teir eru ógiftir.

### Fleiri rán

Tann 1. januar vórðu 54 løgregluøki í Noregi løgd saman í 17 størri øki, men úrslitið tykist ikki hava verið tað, sum myndugleikarnir ivaleyst høvdu vónað. Ein uppgerð vísir nú, at talið á ránum er vaksið nógv síðani á nýggjárinum, og í summum økjum er vøksturin næstan 40 prosent.

Løgregluovastin í Follo, Stein Ulrich, heldur, at løgreglumenninir hava fingið ov nógv skrivstovuarbeiði, og at teir tí ikki hava so góða tíð longur til at forða kriminaliteti av ymsum slagi.

Men tað er ikki tann einasta frágreiðingin. Kriminalovastin Arne Pedersen sigur, at nógva staðni eru fongslini full, og tí ganga dømdir ránsmenn leysir og bíða eftir at sleppa inn at sita. Og bíðitíðina velja summir at nýta til at fremja fleiri rán, sigur hann.

# Bilar

Nr. 120 • hósdagur • 27. juni 2002 • 76. árg.

## Kia Shuma 1.6 LS Hatchback

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 1.6 litur 16V við 101 hk |
| 0-100 km/t | 11.5 sek |
| Bensinnýtsla | 12,5 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 185/65-14 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 452,5 cm |
| Breidd | 172,0 cm |
| Hædd | 141,5 cm |
| Eginvekt | 1100 kg |
| Viðføristrúm | 440 litrar |
| Prísur | kr. 156.800,- |
| Søluumboð | P/f D.B.Bilar<br>J.Bronckgøta 15<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 310600 |

# Shuma avloysir Kia Sephia

**Kia Shuma avloysir nú Sephia her hjá okkum. Talan er um ein nógv broyttan bil við størri motori og munandi betri koyrieginleikum. Shuma er ein rúmligur 5 persóna hatchback við stórum viðførisrúmi**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




*Kia Shuma er ein rúmligur 5 persóna hatchback. Skivubremsur eru nú við øll 4 hjólini*

Kia Shuma er ein rúmligur bilur í miðalklassanum. Í mun til Sephia, ið kom á marknaðin í 1998, er Shuma ein heilt annar bilur at koyra. Koyrieginleikarnir eru munandi betri, og nú eru skivubremsur við øll 4 hjólini. Eisini eru setrini meira sportlig og stútt at sita í, eisini við nógvari ferð í svingum. Motorurin er ein nýggjur 1.6 litur 16V við 101 hk, ið koyrir frá 0-100 km/t uppá 11,5 sek. og toppferðin er 186 km/t. Shuma fæst eisini við automatiskum girum.

### Nógvar broytingar

At síggja til eru eisini nakrar broytingar. Framman er alt nýtt, forlyktirnar eru í klárum glasi og tokulyktirnar eru innbygdar í kúfangaran. Umframt setrini eru eisini aðrar broytingar innan. Á instrumentborðinum er nútímans alu-look, ið sær smart og sportligt út, saman við nýggju setrunum. Eisini á trygdarøkinum er alt sum tað skal við t.d. dupultum airbag og fimm nakkapútum. Bilurin, ið hevur 3 ára garanti, er væl útgjørdur við el-síðurútum og el-síðuspeglum við hita, umframt sentrallás og CD spælara við 6 hátalarum, 12 volt stikk í viðførisrúminum, 2 trippteljarar, sólbrilluhaldara og kopphaldarar.



*Baklúkan er stór og lætt er at koma til viðførisrúmið*

# Kia Sorento kemur á marknaðin í heyst



*Kia Sorento, ið verður ein luksusbilur við allari hugsandi úrgerð, kemur á marknaðin í heyst*

**Seinni í ár kemur Kia Sorento á marknaðin. Talan er um ein stóran 4x4 jeep, ið bleiv vístur á bilaframsýningini í Geneve í mars. Sorento verður ein luksusbilur við 3.5 litur V6 bensinmotori við 192 hk ella 2.5 litur commonrail turbodiesel motori við 140 hk**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Kia Sorento er ein heilt nýggjur 4x4 jeepur, ið eftir ætlan skal kappast við bilar sum BMW X5, Mercedes ML og Lexus RX 300. Sorento er ein luksusbilur við allari hugsandi útgerð. Bilurin, ið sær gott út, fær 3.5 litur V6 bensinmotorar við 192 hk ella 2.5 litur commonrail turbo dieselmotor við 140 hk. Hóast talan ikki er um ein bíligan bil, verða prísirnir tó sera kappingarførir, samanborið við teir bilar hann eftir ætlan skal kappast við.